VIÐMERKINGAR

# Javnaðarflokkin fer ikki at »koyra solo«!

**Elin Heðinsdóttir Joensen**
*fólkatingsvalevni Javnaðarfloksin*



VAL05

Skal nakað av álvara fáast fyri atkvøðuna á hesum fólkatingsvalinum, er Javnaðarflokkurin besta boðið, tí eitt javnaðarumboð á fólkatingi er besta trygdin fyri, at føroyskur politikkur og føroyskar avgerðir afturspeglast í fólkatingsarbeiðinum.

Alt ov ofta hava vit sæð, at einki samsvar er millum tað, sum hendir heima í Føroyum og tað, sum hendir niðri á fólkatingi. Men nú Javnaðarflokkurin situr við landsins leiðslu og er savnandi miðdepilin í landsstýrissamgonguni, er ein javnaðarrødd á fólkatingi ein rødd, ið tosar sama mál sum ráðandi politiski viljin heima í Føroyum.

Fær Javnaðarflokkurin eitt umboð valt á fólkating, verður tað ikki eitt umboð, sum fer at »koyra solo« ella arbeiða ímóti tí, sum løgting og landsstýri seta á politisku dagsskránna, soleiðis sum føroyski viljin er til tað.

Hetta vil gera, at dyr verða latnar upp fyri samstarvi báðar vegir, og Javnaðarflokkurin fer á fólkatingi — eins væl og í Føroyum — arbeiða soleiðis, at breið politisk semja kann finnast um tey stóru og týðandi málini, ið verða frammi komandi árini.

Lat ikki tína atkvøðu fara til spillis, men vera til nyttu og ávirkan á fólkatingi, og tað gert tú best við at atkvøða fyri Javnaðarflokkinum. Vilt tú seta tíni fingramerki á Føroya framtíð, eru vit á javnaðarlistanum besta trygdin fyri, at tú fært nakað aftur fyri tína atkvøðu. Gott val!

# ES - Grundlógin



VAL05

**Ragnar S. Olsen**
*Valevni Fólkafloksins*

Tað málið, sum eg haldi hevur størsta týdningin í komandi fólkatingsvalskeiði, er ES grundlógin.

Hóast vit ikki eru við í ES, hevur hon sera stóran týdning fyri okkum.

Tí um Danmark velur at samtykkja ES-grundlógina, kann tað saktans fáa avleiðingar fyri Føroyar, og tað stórar eisini.

Í ringasta føri, kann tað henda, at vit ikki longur bert eru ein partur av danska ríkinum, men av ES. Sum um tað fyrra ikki er nóg ringt.

Vit eiga at halda fram við, at greina hvørjar avleiðingar tað kann koma at fáa fyri okkum, um danir samtykkja ES grundlógina.

Vit kunnu koma út fyri, at heimildin hjá dønum fellur til Brússel, í samband við samráðingar um størri sjálvræði til okkara. Og er tað trupult at samráðast við Danmark, so verður ikki mætari at samráðast við ES.

Sjálvandi skulu løgtingið og landsstýrið syrgja fyri, at sjónarmið føroyinga verða borðin fram á røttum stað, men vit hava mangan verið vitni til, at virðingin ikki altíð er so stór mótvegis okkum. Men gjøgnum fólkatingsessin hava vit góðar møguleikar fyri, at koma við okkara sjónarmiðum aftur og aftur um neyðugt, júst á røttum stað.

Vit mugu ikki helma í, fyrr enn vit fáa vissu um, at okkara sjálvstýristilgongd kann skipast og avgerast av okkum sjálvum her heima, og ikki á Christiansborg, og fyri alt í verðini ikki í Brússel.

Við Fólkaflokkinum er hetta mál í tryggastu hondum.

# VEL FRAMBURÐ OG SAMBAND

**Marjus Dam**
*valevni Sambandsfloksins*



VAL05

Loysingarfólk royna nú at fáa umboðan í Fólkatinginum, ið teir onki vilja vita av. Tað er ein mótsøgn í sjálvum sær. Teir siga: 1 Vit fara niður til Christiansborg at gera onki. 2: Vit fara niður til Christiansborg at arbeiða. Hetta er at hava mjøl í munninum og blæsa. Higartil hava vit onki úrslit sæð, bert hoyrt dun og goragang. Og tað er ikki arbeiði.

Norðuratlansbólkurin hevur sent faldara til føroyingar fyri danskan pening.

Um Javnaðarflokkurin fær umboðan, er vandi fyri, at fólk, ið gjørdu okkum fyri skommum niðri á Christiansborg í fullveldistíðini, nú enn einaferð sleppa framat, tí tey hava skift flokkin út.

Fólkaflokkurin dumpaði í diplomati á Ckristiansborg. Hvør hevði leiðsluna í fullveldistíðini, tá so nógv miseydnaðist og var oyðilagt?. Vórðu tað ikki Fólksfloksdiplomatarnir? Nei , har er nógv eftir at læra – tað er so víst.

Tjóðveldisflokkurin hevur garterað nógv niðri á Christiansborg - rætt skal vera rætt. Men teir hava ikki arbeitt fyri Føroyum niðri á Christiansborg. Teir hava arbeitt fyri loysing ígjøgnum bakdyrnar – tí føroyingar vilja ikki hava loysing. Harvið arbeiða teir ímóti áhugamálinum hjá føroyingum. Álvaratos, kom við fólkaatkvøðuni um loysing, so fáa tit svarið. Tí loysing so avgjørt eitt mál, ið bert føroyingar skulu avgera í Føroyum. Hetta hevur onki við Christiansborg at gera. Tí tosa vit um loysing ígjøgnum bakdyrnar. Ella ódemokrati, ella lusk .

Einasta trygga val til fólkatingið er Sambandsflokkurin, ið umboðar hægsta og størsta frælsi, ið føroyingar kunnu røkka.

**VEL FRÆLSI**
**VEL FRAMBURÐ**
**VEL TRYGD**
**VEL FRAMTÍÐINA**
**VEL SAMBAND**

Stuðla besta, elsta og størsta flokkinum í Føroyum: Sambandsflokkinum.

# Verulig varðandi virðir

**Jaspur Vang**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy.*



VAL05

Nútíðar vælferðarsamfelagið Føroyar er ikki ein sjálvfylgja.

Framtíðar vælferðarsamfelagið Føroyar er heldur ikki ein sjálvfylgja.

Tí er fólkatingsvalið so avgerðandi fyri vælferðarsamfelagið Føroyar.

Vil veljarin tann 8. februar 2005 vera púrasta vísur í at velja ein flokk, sum hvørki tekur nútíðar- ella framtíðar vælferðarsamfelagið Føroyar sum eina sjálvfylgju, er valið einfalt.

Hví er valið so einfalt ?

Jú, tí veruleikin er tann einfaldið, at føroyingar við ábyrgdarkenslu fyri samtíðini og framtíðini skaptu vælferðarsamfelagið Føroyar í ríkisfelagsskapi. Í sjálvum sær er her talan um eina sera einfalda, men avgerðandi og óreingiliga staðfesting av veruleikanum.

Vit búgva í einum av heimsins mest framkomnu, frælsastu og tryggastu vælferðarsam- feløgum. Tað er her, rótin rann, eins og tað er her, vit ynskja at búleikast - eisini í framtíðini.

Boðskapur Sambandsfloksins hevur verið - og er púra greiður. Flokkurin ynskir framhaldandi at virka fyri m.a.

- álitisfullum samstarvi í ríkisfelagsskapinum,
- betur marknaðaratgongd til londini í Europasamveldinum og
- vinnulívsfremjandi, miðvísari gransking á høgum støði.

Sambandshugsjónin sigraði við seinasta løgtingsval og gjørdist Sambandsflokkurin tí eisini størstur í atkvøðutali. Løtan at gera endaliga upp við kollsiglda fullveldiseksperimentið og fullveldisfíggjarliga óførið er nú komin.

Aðrir flokkar ynskja limaskap í Norðuratlantsbólkinum. Sambandsflokkurin ynskir samstarv millum Føroyar, Danmark og Grønland.

Tað ber snøgt sagt ikki til at hava fólk gangandi á Chistiansborg og mótarbeiða tí politikki, sum verður rikin á Føroya Løgtingi og undirgrava og bróta niður tað, sum føroyingar bygdu upp í ríkisfelagsskapi.Tað ber heldur ikki til at velja flokkar, sum ikki hava eina greiða støðu í spurninginum um ríkisrættarliga støðu Føroya í framtíðini.Valið komandi týsdag er tí í veruleikanum eitt val fyri - ella ímóti ríkisfelagsskapinum.

Sambandshugsjónin byggir á tey grundleggjandi varðandi virðini.

Lat okkum tí standa saman um Sambandsflokkin.

# Børn á Tvøroyri sláa um borð á verjuskipinum

**Aftur í ár fara børnini á Tvøroyri at sláa tunnu umborð á verjuskipinum, Veðrinum**

TUNNUSLÁTTUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Á føstulávint plagar danska verjuskipið, sum er undir Føroyum, at hava eitt serligt føstulávintstiltak fyri børnunum á Tvøroyri

Og í ár verður onki undantak.

Í ár er tað Vædderen, sum er undir Føroym og hetta vikuskiftið fer hann at liggja á Tvøroyri.

Og sunnudagin klokkan 14 fara børnini á Tvøroyri umborð at sláa tunnu og aftaná fáa tey kakao og bollar.

Somuleiðis fer manningin at vísa fólki runt á skipinum.

Tvøroyri og danska verjuskipið hava eitt heilt serligt samband og kunningarstovan á Tvøroyri upplýsir, at seinastu 50 árini er tað bara einaferð, at danska verjuskipið undir Føroyum ikki hevur ligið á Tvøroyri á føstulávint.